## Studebaker



40 ár eftir at framleiðslan av amerikanska bilmerkinum Studebaker steðgaði, kemur ein nýggjur bilur á marknaðin við sama navni. Talan er um eitt nýtt amerikanskt felag, ið stendur aftanfyri nýggja Studebaker.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nissan í Onglandi



Um bilurin ikki sær gott út, verður hann ikki seldur, segði Nissan stjórin Carlos Ghosn, tá hann helt vígslurøðuna, í sambandi við at ein stór nýggj Nissan designmiðstøð herfyri lat upp í London.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiat stórar íløgur



Størsta fyritøkan í Italien, Fiat SpA, skal seta 5 milliardir euro í bilaframleiðsluna, eftir at fyritøkan hevði eitt metstórt hall uppá 2,9 milliardir euro fjórða ársfjórðing í fjør.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Føroya Ellisakfør aðalfund leygardagin

**Leygardagin 22. mars hevur áhugafelagið Føroya Ellisakfør aðalfund í felagshølunum Yviri við Strond. Í felaginum verður arbeitt á nógvum ymiskum frontum**

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*

Síðan áhugafelagið Føroya Ellisakfør bleiv stovnað, fyri meira enn tíggju árum síðan, eru nógv ellisakfør komin til landið, og onnur eru varðveitt í upprunastandi. Áhugafelagið bleiv stovnað við m.a. tí endamáli at varðveita gomul akfør, at skipa fyri felagstiltøkum og útferðum við gomlum akførum, at arbeiða fyri at fáa sersømdir um vegskatt og tryggingargjøld, at fáa til vega og goyma kunnleika um, hvussu akførini upprunaliga hava verið tekniskt og til útsjóndar. Sigast má at áhugafelagið hevur hildi seg til endamálið, tí tað sum arbeitt verður við í felagnum tænir júst teimum endamálum, sum sett vórðu út í kortið í 1992. Formaður felagsins er Ingi Justinussen, næstformaður er John William Old, skrivari er Jens Reinert, kassameistari er Hans Jørn Nielsen og Johan Beder er nevndarlimur. Felagið arbeiðir í løtuni við at menna heimasíðuna www.ellisakfar.fo



*"Nýtt ellisakfar". Niels Pauli Hjaltalin í Havn hevur keypt hendan Mercedes Benz 180 árg. 1961 úr Norra. Bilurin hevur nr.Fø620, ið er sama nummar sum bilurin ið Poul Gaard Hansen keypti sum hýruvogn í 1956. Modellið er óbroytt*




*Her er "sami" bilur frá 1956. Myndin er tikin á Oyggjarvegnum. Bilurin kostaði 18.000 krónur at keypa tá. Á myndin er Ella, kona Poul Gaard Hansen*

# Scion – ungdómsbilar frá Toyota

**Nú er nakað síðan, at vit hoyrdu frá nýggja bilmerkinum hjá Toyota, Scion, ið er ein bilur til tey ungu. Bilarnir vórðu alment sýndir fram á Los Angeles Motorshow í desember**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eitt nýtt bilmerki kemur nú á marknaðin. Talan er um Scion, ið er eitt bilmerki hjá Toyota eins og Lexus. Scion vendir sær beinleiðis til teir ungu kundarnar ella "Gen Y" (Generation Young). Toyota hava roknað seg fram til, at í USA eru 63 millionir persónar í aldrinum frá 8 til 22 ár, sum fara at keypa 4 milliónir bilar í 2010. Soleiðis kann tað eisini sigast. Tað eru tvey modellir av Scion, xA og xB. Báðir eru bygdir yvir sama plattform, men design og aksilfrástøða eru ikki eins. Motorurin er eisini tann sami, 1,5 litur við 108 hk. Seinni koma aðrir motorar. Bilarnir koma fyrst á amerikanska marknaðin.



*Scion xA koma at kosta 16.000 dollarar í USA, sami prísur sum Ford Focus stationcar*

**ítróttur**

Nr. 55 • hósdagur • 20. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# GÍ hevur framvegis spæliloyvið hjá Súna Fríða

*Gøtumenn hava framvegis spæliloyvið hjá Súna Fríða Johannesen, og teir ætla sær ikki at fáa minni fyri hann, enn teir lótu toftamonnum fyri einum ári síðan.*
*Mynd Savnsmynd*




**Gøtumenn ætla ikki at fáa minni fyri Súna Fríða, enn teir góvu toftamonnum fyri einum ári síðan**

LEIKARASKIFTI
*Páll Holm Johannesen*

Hóast framherjin, Súni Fríði Johannesen, fyri góðum hálvum øðrum mánaði síðan vendi aftur til B68, so liggur spæliloyvið framvegis í Gøtu.

Samstarvið millum Súna Fríða og GÍ endaði brádliga, tí framherjin segði seg ikki longur hava so nógva tíð tilfótbóltin. Um skiftið til B68, segði Súni Fríði, at hann hevði fingið góðar treytir, og at hann ikki var noyddur at venja so ofta sum í Gøtu.

Gøtumenn hava tó framvegis spæliloyvið hjá Súna Fríða, og leiðslan í GÍ skuldi mikukvøldið avgera, hvussu stór upphædd skuldi krevjast frá toftamonnum fyri fyrrverandi GÍ-leikaran. Steypakappingin byrjar leygardagin, og tí kann tíðin gerast stokkut at fáa spæliloyvið hjá Súna Fríða uppá pláss, um GÍ og B68 ikki klára at semjast um prísin á Súna Fríða .

Gøtumenn gjørdust heldur skakkir, tá tað gjørdist greitt, at Súni Fríði valdi at skifta til B68, tí orsøkin til, at Súni Friði og GÍ fóru hvør til sítt var, at framherjin ætlaði at finna sær felag í miðstaðarøkinum, so ikki so nógv tíð fór við ferðing. Úr Gøtu verður sagt, at GÍ ætlar sær ikki at krevja minni, enn teir lótu B68 fyri Súna Fríða í 2001.

# FSF úr at gera

**Framvegis eru fleiri leikarar, sum hava skift felag, men enn eru spæliloyvini ikki komin á rætta stað**

SPÆLILOYVI
*Páll Holm Johannesen*

Føroyingar koma sum vanligt í síðstu løtu. Hetta ásannar Fótbóltssambandið nú um dagarnar, tí eitt ótal av fyrispurningum frá feløgum um spæliloyvi verða avgreidd í Fótbóltsambandinum. Hesa vikuna eru 20-25 spæliloyvi hjá 1.deildarleikararunum fingin í rætt lag, nú steypakappingin fer av bakkastokki leygardagin

Virgar Hvidbro í Fótbóltsambandinum sigur, at framvegis mangla fleiri spæliloyvi.

– Fleiri leikarar, sum vit vita hava skift felag, hava framvegis ikki fingið spæliloyvið á rætt stað, og væntandi fáa vit fleiri fyrispurningar hósdagin og fríggjadagin.

Virgar vísur á, at tað sama gongd sum undanfarin ár, og at feløgini altíð koma í seinastu løtu. Til og við fríggjadagin klokkan fýra verða spælaraloyvi avgreidd, og eftir klokkan fýra mugu feløgini gjalda 500 krónur, um tey ætla sær at spæliloyvini skulu avgreiðast til dystirnar leygardagin, sigur Virgar Hvidbro at enda

# Avgerðin um FM fellur í vikuskiftinum

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Komandi vikuskifti fellur avgerðin um, hvør verður føroyameistari í liðkappingini í bridge. Spælt verður í Bridgehúsinum í Havn, og byrjað verður fríggjakvøldið kl. 19.30. Í 1. deild hava tvey lið víst sannførandi og støðugt spæl, og tað skal henda nógv óvantað, um ikki annað av hesum verður føroyameistari. Liðini, talan er um, eru hesi bæði:

Liðið hjá Allan Dal-Christiansen: Per Kallsberg, Dánjal Pauli Mohr, Jóannes Mouritsen, Heðin Mouritsen

Liðið hjá Junior Buss Taxa: Bogi Simonsen, Rói á Rógvu Joensen, Hans Jacob Petersen, Arnbjørn Sivertsen, Gunnar Mouritsen og Høgni Vesturklett

Hini bæði liðini í endaumfarinum eru: Liðið hjá Jónu Grunnveit: Jóna Grunnveit, Henriette Svenstrup, Eyðun Jensen, Niels Nielsen, Øssur Winthereig ogPól Joensen

Og liðið hjá Símin Lassaberg: Símin Lassaberg, Eyðun Anthoniussen, Magni Jøkladal, Robert Langgaard, Marner Joensenog Árni Dam

Innleiðandi kappingina vann liðið hjá Junior Buss Taxa við 196 stigum framman fyri liðið hjá Allan Dal-Christiansen við 193 stigum.

Endaspælið er skipað á tann hátt, at tey fýra liðini hava helvtina av stigunum í innanhýsis dystunum frá innleiðandi umfarinum við sær. Tá er støðan hendan, áðrenn sjálvt endaumfarið byrjar:

Allan Dal-Christiansen
Junior Buss Taxa
Jóna Grunnveit
Sími Lassaberg

**2 deild**

Vinnarin av 2. deild gjørdist liðið hjá Jens Paula G. Nolsøe, og hetta liðið fer beinleiðis upp í 1. deild komandi ár. Liðini á 2. og 3. plássi í 2. deild skulu komandi vikuskifti saman við teimum báðum aftastu liðunum í innleiðandi umfarinum í 1. deild leika um hitt plássið í 1. deild komandi ár. Í hesum bólkinum byrja øll liðini á 0 stigum. Liðini í upp- og niðurflytingarbólkinum eru:

Carl Mikkelsen
Jórun Johannesen
Hallur Ellingsgaard
Petur Winther

Manningin á liðnum hjá Jens Paula G. Nolsøe, sum vann 2. deild, er henda:
Jens Pauli G. Nolsøe — Høgni Hansen
Kaj Alstrup —Hallberg Arnfríðsson
Sveinn Stefánsson úr Íslandi leikti eisini nakrar dystir við á liðnum.

Eitt spæl frá steypafinaluni:

| Vestur | Eystur |
|---|---|
| Sp: EK | Sp: DB96 |
| Hj: 95 | Hj: EKB3 |
| Rú: EK85432 | Rú: - |
| Kl: 64 | Kl: KD852 |

Meldingarnar:

| Bogi | Rói |
|---|---|
| Vestur | Eystur |
| 1rú | 2kl |
| 3rú | 6rú |

Í síðstu viku skrivaði eg um eitt spæl frá somu finalu, har eg sat við 12 hp. Og einum gangandi rútara og undirmeldaði hondina. Tað kostaði 13 imp. Hetta spælið kom tvey spøl seinri. Nú yvirmeldaði eg hondina eitt lítið sindur, og makkarin, sum júst hevði sæð meg siti við einum gangandi rútara og undirmeldað hann, vildi ikki brenna ein slemm afturtat og meldaði tískil 6rú, ið fór niður, aftur 13 imp út.